

# NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK MARS 2004**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00
og sunnudagar kl. 14.00-17.00
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**

## TILTØK MARS 2004

- **Listaframsýning við grafiskari list hjá Ase Bømler er í húsinum frá 06. mars til 18. apríl**
- **Listaframsýning við listamanninum Lennart Iverus er í húsinum frá 06. mars til 18. apríl**
- **Framsýningin "Veiðimentan" er á Bryggen í Keypmannhavn til og við 12. apríl 2004**

### Leygardagur 6. mars

**Kl. 15.00 Framsýning (FO)**
Størri grafisk verk hjá listakvinnuni Aase Bømler letur upp í Klingruni.

**Kl. 15.30 Framsýning (SE)**
hjá listamanninum Lennart Iverus letur upp í Dansistovuni við tekningum og málningalist.

### Mánadagur 8. mars

**Kl. 19.30 Aðalroynd**
**"Sangleikurin "Josef og ótrúliga dreymakotið".**
Framførsla fyri næmingum og foreldrum.

### Týsdagur 9. mars

**Kl. 19.30 Frumsýning: Sangleikurin "Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið".**
Sangleikurin hjá Andrew Lloyd Webber er skrivaður yvir søguna í gamla testamenti um Jósef. Fyriskiparar eru Tónaungdómur (Føroya Studentaskúli og HF Skeið) og Norðurlandahúsið. Atgongumerki á kr. 150.- eru at fáa í NLH og Kunningarstovuni í Havn

### Mikudagur 10. mars

**Kl. 20.00 KLIPP**
Filmsfelag Norðurlandahúsins sýnir filmin "Lilja 4-Ever" leikstjóri Lukas Moodysson, Svøríki 2002(109min) (SE)
Atgongumerki á 60.- kr. eru at fáa í húsinum

### Hósdag 11. mars - Sunnudag 14. mars

**Kl. 19.30 Sangleikurin "Josef og ótrúliga dreymakotið. Kostn. Kr. 150.- Atgongumerki eru at fáa í húsinum og Kunningarstovuni í Havn**

### Fríggjadagur 19. mars

**Kl. 09.00 Málráðstevna 2004**
Fyriskipari er Føroyska Málnevndin

### Sunnudagur 21. mars

**Kl. 16.00 Føroya Symfoniorkestur**
Spæld verða verk av Aron Copland, Bela Bartok Arutjunian og Dvorak. Dirigentur: Bernhard Wilkinson
Atgongumerki kunnu keypast í húsinum og Kunningarstovuni í Havn á kr. 250,-

### Mánadagur 22. mars

**Kl. 19.30 ENEKK og Afenginn - konsert.**
Framført verður alt frá kvæðum, kingosangi, fólka- og spælimans-tónleiki til nýggjan rokk og jazztónleik.
Atgongumerki keypt seinast 12. mars kr. 90.-, aftaná er kostnaðurin kr. 120.-

### Leygardagur 27. mars

**Kl. 19.30 Konsert við Lenu Andersen**
Útgávukonsert í samband við at nýggja fløgan "Can`t Erase It" verður útgivin. Atgongumerki á kr. 150.- eru at fáa í Norðurlandahúsinum og Kunningarstovuni í Havn

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**

# ENEKK OG AFENGINN Í NORÐURLANDAHÚSINUM

**Føroyski bólkurin Enekk kemur út við nýggjari fløgu síðst í februar mánaði, og í hesum sambandi fer bólkurin á konsertferð í Føroyum, og eisini skal bólkurin hava tríggjar konsertir í Norðanlondum**

Enekk spælir alt frá kvæðum og kongosangi, fólka- og spælimannstónleiki til nýggjan rokk og jazztónleik. Kári Sverrisson, sangari og sangskrivari í Enekk varð í fjør, fyri aðru ferð, uppskot til Tónleikaheiðursløn Norðurlandaráðsins.

Á skránni verður tilfar, ið er at finna á teimum trimum fløgunum hjá bólkinum, tilfar av fjórðu komandi fløguni, "Meðan vit nærkast jørðini" og okkurt, ið ikki er tikið upp enn.



**Fløguaktuellu Enekk framføra løg av nýggju útgávuni í Norðurlandahúsinum 22. mars 2004 kl. 19.30**

## Afenginn

Afenginn, ið er mannaður við manning úr Finnlandi, Danmark og Póllandi verður eisini at hoyra hetta kvøldið.

Teirra tónleikaheimur strekkir seg frá rokk yvir jazz til fólkatónleik.

Konsertirnar hjá Afenginn bera dám av stórari "spæligleði", ið saman við einari ágrýtnari og viðtakandi upptraðkan, gera konsertirnar hjá Afenginn til eitt stórt upplivilsi - líkamikið, um talan er um gomul ella ung, dansandi ella lurtandi áskoðarafjøld.

### Teir, ið manna Enekk á ferðini, eru:

**Kári Sverrisson**, sang og kassagittar
**Óli Olsen**, klaver
**Agnar Lamhauge**, kontrabass
**Rógvi á Rógvu**, trummur
**Heðin Z. Davidsen**, el-gittar

### Teir, ið manna Afenginn, eru:

**Kim Nyberg**, mandolin
**Niels Skovmand**, violin
**Rasmus Krøyer**, klarinett, bassklarinett
**Andrzej Krejniuk**, bass
**Rune Kofoed**, trummur, sláverk

# JÓSEF OG ÓTRÚLIGA LITFAGRA DREYMAKOTIÐ

**Upprunaheitið: "Joseph and The Amazing Technicolor® Dreamcoat"**

**Tónleikur:** Andrew Lloyd Webber
**Tekstir:** Tim Rice.
**Týtt til føroyskt:** Anna Kristin Bæk og Dánial Hoydal.
**Leikstjórn:** Jákup Veyhe



Ein bíbilskur sangleikur um Jósef og brøðurnar og faðir hansara Jákup. Søgugongdin verður lýst við sangum, sum fylgja Jósefi frá tí at brøðurnir royna at sleppa av við hann, til hoffið hjá Fárao í Egyptalandi, har hann vinnur álit Fáraos, og til aftureiningina við brøðurnar, sum koma til Egyptalands.

Hetta er ein stór og rættiliga áhugaverd verkætlan. Tónleikurin er góður og skift verður ímillum allar møguligar tónleikastílar. Við í leikinum eru umleið 10 dansarar, 20 leikarar, 20 kórsangarar, 15 tónleikarar og barnakór. Leikurin er hálvanannan tíma til longdar, í tveimum pørtum við steðgi ímillum.

Leikstjórin Jákup Veyhe, Kórleiðarin Zacharias Sørensen og koreografarnir Jóna Thomsen og Elsa Maria Bærentsen hava teir seinastu tríggjar mánaðirnar miðvíst arbeitt við hesari verkætlan. Saman við sniðgevanum Anna Kristin Bæk og scenografinum Jóannes Gaard verður nú seinasta hondin løgd á listarligu útsjóndina.

Verkætlanin er eitt samstarv millum fleiri stovnar, feløg og virki. Felagið Tónaungdómur hevur í samstarvi við Føroya Studentaskúla í Hoydølum, Tórshavnar kvøld- og Ungdómsskúla og Tórshavnar Musikskúla lagt verkætlanina til rættis saman við høvuðsstuðlunum Føroya Banka og Norðurlandahúsinum. Av øðrum stuðlum kunnu nevnast Føroya Tele, Mentamálaráðið og Mentunnargrunnur Landsins.

Frumframsýningin verður týsdagin 9. mars kl. 19.30. Sýningar verða frá hósdegnum 11. marts til og við sunnudagin 14. mars allar dagar kl. 19.30. Atgongumerki á 150,- eru at fáa í Norðurlandahúsinum, á Kunningarstovuni í Havn og á www.kontoin.fo

**Nógvir hentir upplýsingar um leikin fáast á heimasíðuni www.hoydalar.fo/josef**

# MYNDAFRAMSÝNING HJÁ LENNART IVERUS

**Lennart Iverus er føddur í Skara í Svøríki í 1930. Hann er útbúgvin í Listaháskúlanum í Stockholm 1957-1962, í Atelier 17, í Atelier Friesländer, Paris og í Royal College of Art London**

Í myndinum hjá Lennart kann man síggja hansara stóra áhuga fyri dansi, teatri og arkitekturi. Hestar í rørslum, teknaðir við kenslusligum linjum, ofta stórfingin bygnaður, sum skapar scenografi fyri motivi, skapar eina kenslu av skemtiligum sjónleiki.

Arkitekturmotivini hava ein klárleika í skapinum, hvassar linjur og reinar kontrastir millum svart og hvítt. Hann arbeiðir fyri tað mesta við kobarstift og etsing.

Lennart hevur sýnt fram í Nationalmuseum Stockholm, Gustav VI Adolfs samlingar, museerna i Göteborg, Malmö, Norrköping, Eskilstuna och Västerås, Tessininstitutet Paris, Nasjonalgalleriet Oslo o.a.



# FØROYA SYMFONIORKESTUR

**Ólavur Olsen solistur á komandi várkonsertini hjá FSO. Spæld verða verk av Aron Copland, Bela Bartok, Arutjunian og Dvorak. Konsertin verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 21. mars klokkan 1600.**

**Dirigentur:
Bernhard Wilkinson**



Sunnudagin 21. mars hevur Føroya Symfoniorkestur sína árligu várkonsert. Henda konsertin er tann 57. í røðini av konsertum. Skráin hesaferð er sera fjølbroytt. Byrjað verður við einum verki eftir amerikanska komponistin Aron Copland. Tað er Fanfare for the Common Man, og er skrivað undir 2. heimsbardaga sum ein "cadeau" til vanliga hermannin. Hetta verkið er fyri brass og percussion; stutt, bert einar 4 minuttir og er upprunaliga burtur úr hansara 3. symfoni, men verður sera ofta spælt sum ein sjálvstøðug eind.

Annað verkið er ein Trompetkonsert. Havnardrongurin, Ólavur Olsen, sum í summar var liðugt útbúgvin sum trompetistur frá konservatoriinum í Århus, verður solistur í einum sera áhugaverdum verki av armenska komponistinum Alexander Grigori Arutjunian. Hetta verður fyrsta stóra almenna framførsla hansara við einum symfoniorkestri. Hetta er krevjandi tekniskt verk, sum í sær ber ymisk stílsløg, so sum spenna frá jazz til romantisk løg, við sera breiðum akkordum í blásarunum; so hóast hetta er verk, tónasett mitt í seinastu øld, so hevur tað í sær lagadám, sum eins væl kundi verið frá fyrrverandi øldum.

Triðja verkið er Rumenskir fólkadansir eftir ungarska tónasetaran Bela Bartok (1881-1945) Bartok er – umframt at hann var komponistur og frálíkur pianistur – kendur sum tann stóri savnarin av ungarskum fólkatónleiki; og nógv av hansara verkum eru ávirkaði av hesum arbeiði. Hann royndi við hesi gransking at finna fram til tann upprunaliga ungarskrumenska tónleikin, og sigur, at tann meira romantiski ungarski sigoynaramusikksurin, sum Liszt metti sum tann upprunaliga, als ikki var tað. Hann sigur, at sigoynaramusikkurin er sprottin úr heilt øðrum umhvørvi. Bartok hevur savnað ikki færri enn 6000 ymisk løg úr økinum har eysturi, eisini fram við Svartahavinum. Verkið, sum FSO fer at framføra, hevur fýra stuttar satsar.

Eftir steðgin kemur symfoni nr. 8 í G-dur eftir Antonin Dvorak (1841-1904) Dvorak er tjekki, føddur í einum lítlari bygd í Böhmen. Hann er ein sannur melodikari, sigur kendi musikkummælarin Kretschmer, og sammetir hann Dvorak við Franz Schubert. Henda áttanda symfoniin av Dvorak var ikki so kend, og metir onkur orsøkina vera, at hon upprunaliga var útgivin av einum enskum forlag og ikki av einum kontinentalum.

Um hesa symfoniina sigur áðurnevndi Kretschmer m. a., at hon ikki hevur ein so typiskan symfoniskan bygnað, men kann kanska heldur metast sum ein "rapsodisk suita".

Fyrsti satsur byrjar við einum heldur tunglyntum lag í g-moll. Høvuðsleiklutin hevur eitt G-dur tema, sum byrjar í floytuni, og undir liðini av hesum kemur eitt týdningarmikið marsjmotiv. Annar satsur verður mettur sum tann mest upprunaligi í symfoniini. "Hátíðarligur kirkjutónleikur, serenadur, reystur marsjljómur úr firruni – púra ymisk evni eru her sera heppiliga sett saman", heldur nevndi ummælarin fram. Triðji satsur hevur valsikent stev og við tí serliga melodiska søtleika, sum Dvorak dugir so meistarliga væl; sipar til hansara slavisku dansir.

Upp ímóti hesum heldur tunglynta lagadámi eru teir glaðaru tónarnir í trioini og tann sprækna codain. Finalan byrjar við eini trompetsolo, sum kundi fingið ein at hugsað um trompetsignal frá eini hermannalegu; síðani heldur satsuirn fram sum ein variasjón yvir tema, sum er í ætt við høvuðstemaið í fyrsta satsi.

FILMAR, FRUMSÝNDIR Í MARS:

# LILJA 4-EVER



**Úr filminum "Lilja 4-ever" ið verður sýndur í Norðurlandahúsinum mikudagin 10. mars kl. 20.00**

Í sambandi við altjóða kvinnudagin vísir Klipp, Filmsfelag Norðurlandahúsins, svenska filmin Lilja 4-Ever. Hetta er filmur um 16 ára gomlu Lilju, sum er vaksin upp í fyrrverandi Sovjettsamveldinum og ikki eigur sýru í vegg, tá mamman rýmir til USA við einum fremmandum manni. Tá hon møtir Andrei tykist alt annaleiðis. Hann billar henni inn, at í Svøríki er eitt betri lív hjá ungum baltiskum kvinnum. Og har byrjar søgan, sum ikki er tespulig. Lukas Moodyson hevur leikstjórnað og eins og í undanfarnu filmunum prógvar hann enn einaferð framúr hegni tá umræður arbeiði við ungum fólki. Sterki og viðkomandi filmurin "Lilja 4-Ever" verður sýndur í Norðurlandahúsinum tveir dagar eftir altjóða kvinnudagin, hin 10. mars 2004.

# LISTAFRAMSÝNGININ HJÁ AASE BØMLER OLSEN

**Størri grafisk verk hjá listakvinnuni Aase Bømler Olsen letur upp í Klingruni leygardagin 06. mars 2004 kl. 15.00, og er framsýningin er gjørd serliga til Norðurlandahúsið og ljósviðurskiftini í húsinum**



Aase er fødd í Keypmannahavn í 1952. Hon hevur havt eginframsýningar og tikið lut í bólkaframsýningum í Norðurlondum og gjørt rúmprýði, umframt bøkur til børn.

Framsýningin er gjørd serliga til Norðurlandahúsið og ljósviðurskiftini í húsinum.

Aase sigur frá eini søgu. Íblásturin hevur hon fingið úr yrkingini "Fyrtårnet ved Montséger" hjá Finn Langgard.

Yrkingin er skrivað til minnis um 16. mars 1244, tá ið 205 "katharar" gingu syngjandi yvir til trúvillinga bálið við borgina Montségur í Suðurfrankaríki. Plássið nevnist enn tann dagin í dag fyri "Plássið hjá teimum brendu".

"Katharar" var kristið fólk, sum hevði vent verðsliga lívinum bakið, og sum nú livdi sum guðsrøkið fólk. "Katharar" vóru væl umtóktir í øllum Suðurfrankaríki og høvdu nógv viðhaldsfólk. Rómverska kirkjan byrjaði í 1181 at forfylgja "katharunum". Aftan á fleiri fleiri krossferðir, eydnaðis at enda rómversku kirkjuni at beina fyri tí síðsta katharanum við Montséger.

Hvussu kanst tú siga frá tí, sum eingin kann siga frá?. Her verður hugsað um lívsins týdningarmiklu spurningar so sum frælsi, kærleika o.s.fr. Hetta eru spurningar, Aase Bømler Olsen roynir at seta/lýsa í verkum sínum á framsýningini í Norðurlandahúsinum.

Øll listaverkini eru gjørd við blandaðum teknikki á tunnum ríspappíri. Listaverkini hanga í vindeyganum við dagsljósinum sum bakgrund. Motivini eru "sterkt foreinklaði og symbolsk".

Í Klingruni verður eisini ein installatión av perforeraðum pappíri at síggja, sum verður lýst við projektørum, og sum so aftur gera ein "skuggavirkning" á hvíta veggin. Samstundis verður yrkingin, sum er inspiratión til evni í allari framsýningini, at lesa á vegginum.

Aase Bømler Olsen og Finn Langgard verða til staðar, tá ið framsýningin letur upp.

**Framsýningin verður húsinum til og við 18. apríl.**

# ÚTGÁVUKONSERT VIÐ LENU ANDERSSEN



**Mynd: Bárður Eklund**

Sama dag, sum nýggja fløgan við Lenu Anderssen "Can't Erase It" kemur út í Føroyum, fer Norðurlandahúsið at vera karmur um útgávukonsert við føroyskkanadisku songkvinnuni. Talan er um egin løg, ið Lena Anderssen og Niclas Johannesen hava skrivað til nýggju útgávuna, sum Óli Poulsen hevur produserað.

Fløgan er tikin upp í eitt nú Lundgaard Studio í Danmark har føroysku tónleikararnir James Olsen, Hans Poulsen og Jákup Zachariassen eisini vóru við til innspælingarnar. Lena fer hetta kvøldið at hava orkestur við sær, ið telur somu manning - Óla, Hans, James, Niclas og Jákup - umframt aðrar gestir. Talan verður bert ta einu konsertina í høvuðsstaðnum.